# Hugleiðingar undir víkjandi búskapi

**-Tað verður sagt av mongum, at nú skulu fiskastovnarnir byggjast uppaftur, og tað er tað sama sum at minka fiskiskapin ella halda heilt uppat. Hetta hevur víst seg ikki at passa, oig tað eru mong dømi um, at fiskur kemur ikki aftur, um tað verður steðgað við at fiska, skrivar Olaf Olsen, fyrrveandi vinnulívsmaður og politikari í hesari viðmerkingini til tær ætlaðu broytingarnar í fiskivinnuni**



- *Í Føroyum er tað ikki gott latín at siga, at tað kann vera rætt at stuðla nakað, sum hevur við vinnulívið at gera*

**HUGLEIÐINGAR**
*Olaf Olsen*

Fleiri og fleiri skip leggja, oljuprísurin er á himmalferð, løgmaður veit ikki síni livandi ráð, og føroyingar flyta burtur og koma helst ikki aftur. Umframt hetta eru fiskastovnarnir niðurfiskaðir. Soleiðis hevur ljóðað í seinastuni

Tað jú soleiðis, at alt eftir, hvar tú ert í samfelagnum, so síggja kreppur ymiskar út. Eg veit tað frá mær sjálvum, og eg síggi, at onnur hava tað nakað á sama hátt. Spyr bert, um tað ikki er rætt at spara í trongum tíðum, og tey flestu halda, at tað er rætt, men tað eru sera fá, sum halda, at tað er rætt at spara á tí rókini, har tey sjálvi sita. Hetta er ein royndur lutur. Tann, sum er settur til at spara á fleiri feltum - eisini har hann sjálvur er – man hava ásannað mangar ferðir, at tað er torført at fáa umboðini fyri tann sektorin, sum sparast skal á, at ganga við til at spara hjá sær. Eg eri nú mest uttan fyri tað, sum eg annars havi verið uppi í, men eg veit ikki, um eg dugi at síggja tingini frá einum meira neutralum støði.

Oljukreppur hava verið fleiri. Ein byrjaði í 1979. Samstundis var ein onnur kreppa, sum tó sást og hoyrdist lítið til. Øll londini við Norðuratlantshavið settu síni fiskimørk út á 200 fjórðingar. Hetta gekk mest út yvir føroyingar, tí so stórur partur av okkara veiðiflota royndi uttanfyri tað nýggja føroyska sjómarkið, og vit høvdu hvørki royndirnar ella førini til at seta inn á ta føroysku leiðina.

## Hættir at loysa kreppur uppá

Tey flestu vilja helst siga, at hátturin at loysa kreppur uppá við at veita ymisk sløg av studningi, sum varð byrjaður í 1975, og tók dik á seg í 1979, var skeivur, og helst førdi til ta stóru kreppuna, sum kom í 1990 og út eftir.

Óivað var tað so, at av tí at studningurin var verðandi og ikki lækkaður aftur, hóast tað kundi verið gjørt, so fór tað av sporinum til endans. Hann varð ongantíð játtaður av løgtinginum meira enn eitt ár í senn. Tað vóru aðrar lógir, sum eisini áttu at verðið avtiknar fyrr, enn tær vórðu. Til dømis var lógin, sum kallaðist "Stuðul til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum", í gildi nógv ár aftaná, at fleiri før ikki áttu at komið inn í flotan. Tað hevði verið áhugavert, um onkur fór at kanna og lýsa bæði tær positivu og negativu síðurnar á stuðlinum.

Prinsipielt haldi eg ikki, at tað altíð er skeivt at veita stuðul, heldur ikki til eina høvuðsvinnu, men trupulleikin er, at tað skulu sterkir politikarir til at passa slíkar lógir, og tað er tíverri ikki altíð, at teir eru til steðar

Eg haldi, at um studningurin hevði verðið avtrappaður frá 1984 og úteftir, so hevði ikki verið so ógvislig kreppa fyrst í 1990-unum, men tá ið hann næstan allur varð avtikin eftir bert tveimum árum, so mátti tað geva ein skelk.

Ofta er tað soleiðis, at tá ið nakað verður gjørt, sum vísir seg at vera skeivt, so verður sagt, at hetta skal aldrin henda aftur, og so fer man yvir í hina grøvina, sum mangan er líka skeiv sum tann, man roynir at koma burturúr. Tí eigur fyrsta hugsanin, ein ger sær, at ansa eftir, at ikki verður farið ov langt yvir í hitt borðið, tí tað kann geva líka stóra slagsíðu, men bert á mótsett borð.

Í Føroyum í dag er tað ikki gott latín at siga, at tað kann vera rætt at stuðla nakað, sum hevur við vinnulívið at gera, men eg eri ikki samdur, og okkum tørvar ikki at fara so langt út í heimin fyri at síggja, at nógvur stuðul verður veittur av ymiskum slag, og summa staðir verður tað rópt búskaparligt undur, sum tað hevur ført við sær. Til dømis eru Portugal og Írland dømir um hetta. Annars var talan um, at ES skuldi halda uppat við sínum landbúnaðarstuðli, men tað eru astronomiskar upphæddir, sum enn verða veittar. Um tað er gott ella ikki, dugi eg ikki at døma um.

## Fiskivinnupolitikkur

Nú hava vit havt eina fiskivinnuskipan síðani 1996, sum byggir á veiðiorku. Eg haldi, at skipanin er góð, men av tí, at hon byggir á veiðiorku, so má eisini fylgjast við, hvussu veiðiorkan er, og hvussu og um hon broytist. Tað er jú meiningsleyst ikki at fylgja við og kanna, hvussu hon háttar sær. Skip koma og fara úr flotanum, og ymist verður gjørt við tey, sum kann broyta veiðiorkuna. Tað má vera eftirlit við tí á sama hátt, sum eftirlit er við fiskiskapinum úti til havs. Eg vil halda uppá, at tað er lættari at hava eftirlit við viðurskiftiunum umborð á skipunum enn tað er at hava eftirlit til sjós, t.d. við hvat verður útblakað av fiski. Tað eru nógvir stovnar og fyritøkur, sum vita, havt hendir við tí, sum verður gjørt umborð á skipunum við nýggjum tólum og øðrum, og tað er lítið fyri hjá myndugleikunum at biðja tey hava eftirlit við, hvat verður gjørt, og siga myndugleikanum frá tí. Teir flestu av hesum stovnum eru ofta umborð á skipunum kortini, og kunnu tí saktans boða frá teimum broytingum, sum hava ávirkan á veiðiorkuna.

Hvat eigur at verða brúkt sum mát fyri veiðiorku kunnu kanska vera ymiskar meiningar um. Hjá trolarum eru fiskidagar og pelatrekk hampiliga góð mát, og hjá línuskipum dagar og húkar. Eg hugsi, at um tað verður fylgt væl við hesum, so ber til at halda tað á einum brúkiligum støði, men sum nevnt, so skal tað hondhevast fyri at kunna virka nøktandi.

Eg minnist, at Jóhann Sigurjónsson, leiðari á fiskirannsóknarstovuni í Íslandi, segði við meg, at hatta er helst ein góð skipan, men hvussu kunnu tit halda skil á veiðiorkuni? Eg helt við hann, at tað átti at vera lættari at halda skil á veiðiorkuni, enn at fylgja við tí, sum hendir umborð á skipunum í sjónum. Eg veit ikki,

